Formansfrágreiðing 2008/09

Inngangur

ST sáttmálin

Àrið 2008 var fyri MBF eitt spennandi og virkið ár, og á ein hátt eitt sermerkt ár, við tað at mest sum øll arbeiðsorka hevur verið løgd í ST sáttmálan. Nú er so uppskot til samtyktar um at seta *" ST sáttmálan um rættindi einstaklinga ið bera brek"* í gildi í Føroyum, borin í tingið, og hevur 1. viðgerð verið av uppskotinum.

Tað kennist hugaligt at kunna byrja formansfrágreiðingina við hesum innganginum, tí tað kendist sum langt var á mál, tá ið vit byrjaðu arbeiðið. Drúgt arbeiði hevur verið í arbeiðsbólkinum við at viðgera innihaldið í sáttmálanum og at gera tær kanningar sum skuldu til, um vit skuldu seta hann í gildi í Føroyum.

Men "so far so good" at vit eru komin á mál við hesum arbeiðinum, tí ikki fyrr enn nú byrjar tað veruliga arbeiðið, at fáa sáttmálan "implementeraðan" í føroyska samfelagið. Vónandi fer sáttmálin at virka sum eitt "livandi" skjal, sum kann brúkast av øllum føroyingum, hjá kommunum, fjølmiðlum, felagsskapum, ítróttarfeløgum, mentanarfeløgum, kirkjum, samkomum og so framvegis. Sáttmálin skal vera livandi á tann hátt, at hann skal virka sum bati fyri fólk við breki í allari tilrættalegging í samfelagnum, og her liggur stóra uppgávan hjá MBF í framtíðini. Vit mugu framhaldandi saman við politiska myndugleikanum vera trygdin fyri, at sáttmálin verður hildin.

Eg haldi at ST sáttmálin er eitt gott arbeiðsamboð hjá MBF, tí vit kunnu brúka hann sum eitt arbeiðsskjal, sum "inspiratiónskeldu," sum eitt skjal har vit seta fokus á okkara framtíðarætlanir, og ikki minst raðfesta, hvat vit vilja virka fram ímóti. Endamálið er eisini, at orðaskiftið á tingið um sáttmálan, kann fáa politikarar at broyta hugburð, taka burtur forðingar og gera mál, ið viðvíkja breki, meiri ítøkiligt.
Tá Føroya Løgting bindur seg til at halda ein tílíkan altjóða sáttmála, tá gevur tað eisini teimum eitt gott amboð at orða framtíðar politikk eftir.

Bústaðarmál

Eitt tað fyrsta málið MBF ætlar at seta sjóneyku á, verður í tráð við grein 19 í ST sáttmálanum, har dentur verður lagdur á møguleikan "at liva sjálvstøðugt og at verða tikin upp í samfelagið".

Grundleggjandi virðir í føroyska samfelagnum er sjálvræði og møguleikin at ávirka egna lívsførslu, og út frá tí kunnu fólk trívast og virka. Øllum fólkum, eisini fólk við breki, skal standast í boði, at hava ein virðiligan bústað. Ein virðiligur bústaður merkir eitt stað, har tú býrt trygt og trívist, har atlit eru tikin til tín tørv, og har tú veitst, at her er staðið sum lýkur øll krøv, sum setast til akkurát tín bústað. Teimum fólkum sum ikki sjálvi megna at skapa sítt egna heimaumhvørvi, eigur samfelagið at hjálpa á bestan hátt, at finna ein virðiligan bústað.

Nú bústaðarpakkin loksins er samtyktur á Løgtingi, eftir í fleiri ár at hava verið á veg, eru vit sannførd um, at bústaðarmál verða eitt týðandi mál fyri okkum at viðgera í MBF í framtíðini, og er tað okkara ætlan at fylgja væl við á bústaðarøkinum. Umráðandi er, at vit finna útav, hvørjir

møguleikar eru í lógini, og um tað m.a. er møguligt hjá einum fyritíðarpensjonisti at fíggja og gagnnýta lógina til fulnar.

Endurvenjing, ein eftirbátur í Føroyum

Eitt sera viðkomandi mál sum MBF ferð eftir ferð hevur víst á, er tann stóri tørvur sum er á eftirviðgerð í Føroyum fyri fólk við varandi sjúku ella breki.
Eftir, at MBF áhaldandi og í fleiri ár gjørdi vart við vánaligu støðuna á økinum, varð loksins ein arbeiðsbólkur settur, sum skuldi koma við einum áliti um, hvussu vit best kundu seta í verk skipaða endurvenjing í Føroyum.

Í november í 2007 kom so "Álit um endurvenjing fyri fólk við førleikatarni- ein liður í eini endurmenningarætlan.".

Ikki kann sigast, at nógv hevur verið at hoyrt um, hvussu og nær man politiskt ætlar at seta í verk tær niðurstøður sum álitið mælir til.

Í Tíðargreinini "eitt íkast til føroyska orðaskiftið" í Sosialinum 9. mars 09, sigur Landsstyrismaðurin í Heilsumálum Hans Pauli Strøm, at fólkaheilsa er fyri øll, og at tað er eitt bragd at fólkaheilsuætlan føroyinga ikki bleiv eitt skuffuálit, men harafturímóti eitt livandi álit.

Ikki eitt ónt orð um hesa ætlan frá MBF, tí vit skulu vera tey fyrstu, at viðganga at tað er umráðandi at øll fólk gerast varug við, at tað er gott at fyribyrgja og ansa eftir síni heilsu. Ein tílík heilsuætlan tekur støði í tí stóra partinum av Føroya fólki, og somuleiðis støði í tí fríska, sum skal blíva betri, men eisini teimum sum eru í vandabólki at fáa sjúkur, sokallaða vælferðarsjúkur.

Her fer MBF at minna á, at hundraðtals førleikaskerdir føroyingar tíverri ongan ans fáa á uppvenjingarøkinum,og er okkara niðurstøða, at álitið um endurvenjing sum Hans Pauli fekk handað í 2007 tíverri sær út til at verða blivið eitt skuffuálit, og tað er átaluvert. Vit bíða enn eftir, at man politiskt vil gera hetta álitið til eina livandi virkisætlan, eins og fólkaheilsuætlana og sum kundi givið hundraðtals føroyingum við skerdum førleika ein betri lívskvalitet.

Heilsumálaráðharrin sigur víðari, at klassiska heilsuhugtakið hjá WHO er: *Heilsa er ikki bert frávera av sjúku men eisini likamlig sálarlig og sosial vælvera.* Fólk við sjúku/breki, sum ikki fáa endurvenjingar , hava ongan kjans at virka í samfelagnum og merkja onki til at hond verður tikin um teirra sálarligu og sosialu vælveru, tí man politiskt ikki raðfestir henda bólk.

Í greinini verður eisini víst til orðini frá einum svenskum sjúkrarøktarfrøðifelag, citat: *Heilsa er eitt tilfeingi í dagliga lívinum- ikki eitt mál við lívinum, men ein miðil fyri einum góðum lívi.*
Tað kunnu við ikki verða ósamd um, men eg vildi ynskt at hetta hugtakið kundi fevnt um allar føroyingar. Ein háttur fyri einum góðum lívi hjá einum fólki við sjúku/breki, er at fyribyrgja at fólk gerast sjúkari enn tey eru, at settar verða í verk ætlanir, sum kunnu gera fólk aktiv í føroyska samfelagnum, eitt nú við at gera álitið um endurvenjing til eitt livandi álit.

Tað er okkara vón, at vit í komandi tíð, fara at síggja politiskan vilja og raðfesting við at seta í verk átøk, so vit kunnu byrja eina tilgongd har vit kunnu siga at fólkaheilsa er fyri øll, eisini fyri fólki við sjúku/breki?

Førleikamenning

Í einum meginfelag, ið telur 23 limafeløg er eisini týdningarmikið at taka í egnan barm og hyggja at okkara leiklut sum Meginfelag. Vit vita, at samfelagið broytist, og tað skjótt, og at felagsskapir sum okkara ofta skifta fólk í nevndum m.a. tí nevndararbeiði kanna vera krevjandi. Hettar setur stór krøv til førleikan hjá nevndarlimum. MBF eigur tí alla tíðina at stremba eftir, at førleikamenna okkara limafeløg og okkum sjálvi. Tað er so skjótt at gerast eftirbátar og tá gerst felagsarbeiði lættliga eintýðugt og ótíðarhóskandi. Vit vilja tí raðfesta at førleikamenna limafeløgini við javnan at skipa fyri skeiðum, temadøgum og fyrilestrum.

Í september hava vit fingið ein spennandi persón úr Danmark at koma og hava temadag/skeið við okkum. Temdagurin verður í hølunum hjá Starvsmannafelagnum og verður temaið fyri dagin nakað um “filantropisk feløg í eini broytingartíð”. Vit vóna at feløgini taka væl undir við hesum átakinum.

Kundi eg havt nakað ynski, nú fíggjarlógin fyri 2010 verður smíðað, so er tað ynskið um at fáa størri játtan á fíggjarlógini. Hettar ynski hava vit í fleiri ár.
MBF veit, hvussu nógva ókeypis orku feløgini leggja í arbeiðið, at bøta um korini hjá teirra limum. Tíverri síggja vit ikki á sama hátt politiska viljan í raðfestingini, at hækka fíggjarliga stuðulin til MBF, nú feløgini gerast alsamt fleiri. Vónandi fáa vit politiska vælvild fyri hesum ynskinum í 2010.

Leila Solmunde, forkvinna.

Ársfrágreiðing

Almannapolitikkur

Aftaná at nýggj samgonga varð skipað í september mánað, vóru vit á fundi við Rósu Samuelsen, nýggju landsstýriskvinnuni í almannamálum. À fundinum kunnaðu vit hana um, hvat MBF arbeiðir við, umframt at viðkomandi mál fyri MBF vórðu tikin upp til viðgerðar, m.a. varð spurt eftir, hvar búðstaðarpakkin var blivin av, og um ætlanina at gera nýggja forsorgarlóg. Í sambandi við hettar, vístu vit á niðurstøðuna í livikorskanningini, ið vísir at fyritíðarpensionistar ikki eru nøgdir við tænastustøðið í samband við málsviðgerðina á Almannastovuni. Tey sakna dygdargóða kunning, samskifti og samskipan á Almannastovuni. Vit heittu tí á Rósu Samuelsen um at taka hendan partin við í nýggju forsorgarlógina. Eisini heittu vit á landsstýriskvinnuna um at seta pengar av á fíggjarlógina, so møguligt varð at seta ein samskipara í starv á Almannastovuni, sum skal taka sær av at samskipa fyri at tryggja samanhang og harvið betri tænastu fyri tann einstaka. Vit vita jú, at stóri trupulleikin í dag er, at hvør rennur í sínum lag, frá Peri til Pól fyri at fáa sum frægast burturúr, og er tað ikki nøkur góð og virðilig loysn.

Pensjónsviðurskiftir

Í samband við lógaruppskot um at lækka áseting og javning av almannaveitingum frá 4% til 3% varð lagt fyri tingið, sendi MBF mótmælisskriv til Løgtingsformannin umframt allar løgtimgslimirnar um at taka hettar uppskotið aftur, tí vit meta og Livikorskanningin vísir greitt, at fyritíðarpensiónin framman undan er ov lág. Tíverri tók Løgtingið ikki okkara mótmæli til eftirtektar.

Ráðstevna 8. oktober 2009

Triðja ráðstevnan í samband við ST sáttmálan verður eftir ætlan í Norðurlandahúsinum 8. oktober. Evni á seinastu ráðstevnuni fer at snúgva seg um sosiala økið og sektorábyrgd. Enn er endaliga skráin ikki fastløgd.

Heilsupolitikkur

Aftan á valið í januar høvdu vit í juni mánað fund við Hans Paula Strøm, afturvaldan landsstýrismann í almanna- og heilsumálum. Á fundinum viðgjørdu vit nógvar av teimum somu spurningunum, sum vit viðgjørdu á omanfyrinevnda fundi við Rósu Samuelsen. Men harumframt greiddi Hans Pauli Strøm frá endurvenjingarætlanini, sum gongd skuldi fáast á m.a skuldu pengar setast av á fíggjarlógini fyri 2009 til at seta fólk at fyrireika eina endurvenjingareind undir Nærverkinum, sum framyvir skal samskipa og skipa fyri allari endurvenjing í Føroyum. Men tíverri er nú, tá tað avtornar, ikki settir nakrir pengar av á fíggjarlógini fyri 2009.

Arbeiðsmarknaðarpolitikkur

Rúmligur arbeiðsmarknaður

Tað er sera týdningarmikið, at fólk eru virkin í dagligdegnum, og kenslan av at verða sum hini er sterk hjá flest øllum fólkum. Kanningin, sum MBF gjørdi at livikorunum hjá fyritíðarpensjonistum í

Føroyum vísti eisini heilt greitt, at fólk saknaðu okkurt at fara út til. Tey ynsktu, at dagurin varð býttur upp, so tað ikki varð so einsligt bert at sita heima.

Í 2007 byrjaði eitt samstarv við Ráðið fyri Brekað, har MBF varð ein av fleiri pørtum, sum varða av rúmliga arbeiðsmarknaðinum. Hini í bólkinum vóru Samtak, ALS, ALV, MBF, Almannastovan, Javni, og Psykiatriski Depilin.

Endamálið var at fáa vitan og uppskot um, hvørji tiltøk eiga at verða gjørd, til tess at fáa ein rúmligan arbeiðsmarknað. Tann fyrsti fundurin sum vit kallaðu kveikingarfundur gav greiða ábending um, at nógv var at fara í gongd við, og nógv uppskot komu fram.
Nøkur uppskot vóru um t.d vard størv á starv.fo við tilvísing til avvarðandi ráðgeva, seta á stovn konsulentskipan við handikappráðgevum, broyta sjúkradagpeningalóggávuna við áseting um at fylgja upp aftaná 4 ella 8 vikur og at útgreina læknaváttanir, so fólk ikki verða fulltíðarsjúkrameldað uttan neyðugt. Harumframt varð í Ráðnum fyri brekað tosað um at útpeika eitt arbeiðspláss at vera fyridømi, tá tað snýr seg um rúmliga arbeiðsmarknaðin.

Ráðið fyri Brekað hevur síðani tikið evnini upp og lýst tey, og hava vit í MBF givið okkara íkast til kjakið. Av ítøkiligum kann nevnast at Ráðið fyri Brekað hevur sent skriv til Fíggjarmálaráðið um at taka atlit fyri rúmliga arbeiðsmarknaðinum, tá sáttmálar verða gjørdir við yrkisfeløg. Víst varð á dømi frá privata arbeiðsmarknaðinum, har protokollat varð gjørt um rúmliga arbeiðsmarknaðin í 2007. Í áheitanini til Fíggjarmálaráðið varð eisini víst til ásetingarnar í samgonguskjalinum, har sagt verður, at almenni setanar- og starvsfólkapolitikkurin eisini skal viðvirka til rúmliga arbeiðsmarknaðin, eins og almenn arbeiðspláss yvir ávísa stødd skulu binda seg til at taka fólk í vard størv.

Ráðið fyri Brekað hevur heitt á MBF um at gera uppskot til, hvussu ein skipan við handicapráðgeving kann samskipast og virka í Føroyum. Sum fyrsta stig skipaði MBF í februar fyri einum temadegi fyri viðkomandi partar, Til fundin høvdu vit fingið Bergtóru Høgnadóttir Joensen at greiða okkum frá, hvussu skipanin við handicapkonsulentum er skipað og virkar í Danmark. Aftan á var høvið at tosa um, hvussu vit kundu skipa okkum í Føroyum.

Næsta stig verður at taka upp samstarv við ALS um at skipa møguliga handicapráðgeving innan fyri ALS. Hetta arbeiðið vilja vit seta á dagsskránna til heystar aftur.

ALV:

MBF hevur ein lim í stýrinum hjá ALV. Tað er Almannaráðið sum velur limirnar í stýrið. Fyri MBF merkir tað, at vit kunnu verða við til at ávirka rúmliga arbeiðsmarknaðin, endurbúgvingarøkið og útbúgving fyri førleikaskerd sum heild.
Seinastu tvey árini hevur stýrið arbeitt miðvíst við einari verkætlan á Kambsdali. ALV hevur leingi havt ynski um at skapa nýggja vinnu fyri fólk við skerdum arbeiðsførleika, og hetta er nú um at verða veruleiki.
Til heystar byrjar eitt framleiðsluvirki á Kambsdali. Við hesi vinnu skapar ALV eini 25 arbeiðspláss fyri fólk úr Norðoyggjum, Eysturoy og nakað av Streymoy.

Høvðusvirksemið á virkinum verður ein endurnýtsluhøll, sum fer at umvæla gamlar møblar og lutir, sum skulu seljast. Eftir ætlan fer framleiðsluvirkið eisini at framleiða ymiskar lutir ella partar av framleiðslulutum fyri føroysk virkir.

ALV á Kambsdali verður eitt arbeiðpláss fyri fólk, ið hava fingið tillutað ½ ella fulla pensjón, og eru hesi ein partur av Føroya fólki, sum vanliga ikki eru so sjónlig á føroyska arbeiðsmarknaðinum, men sum gjøgnum mennandi tilboð kunnu geva sína arbeiðsmegi til føroyska samfelagið, og hervið eisini verða við til at geva vinnulívinum í Føroyum størri og fjølbroyttari arbeiðsmegi. ALV hevur virksemi í Smiðjugerði í Havn, Skúlan við Áir og Tinghúsið á Hjalla.

Í stýrinum fyri ALV sita: Johan Samulesen formaður, Jóna Olsen, Leila Solmunde MBF, Ernst Jacobsen ALS, Esther Dahl Vinnuhúsið. Stjóri í ALV er Kristina Larsen.

Útbúgvingarpolitikkur

Ráðstevnan september 2008

Ráðstevnan í september var ein av trimum, ið skipað hevur verður fyri í samband við ST sáttmálan, og snúði hon seg um undirvísing í fólkaskúlanum. Endamálið við ráðstevnuni var at varpa ljós á týdningin ST sáttmálin fær fyri undirvísingina av børnum við serligum tørvi, lýstur út frá ymsum sjónarhornum.

Jóannes Ejdesgaard setti stevnuna. Heðin D. Poulsen greiddi síðani frá um upprunan til sáttmálan, hvat hann inniheldur og týdningin av, at Føroyar gerast partur av sáttmálanum. Óli Wolles, pápi at dóttur við serligum tørvi, lýsti sera væl verandi skúlatilboð og støðuna foreldrini standa í. Høvuðsrøðari var Niels Egelund, professari við lærda háskúlan í Århus. Hann greiddi frá týdninginum, sáttmálin fer at fáa fyri undirvísingina. Hann segði m.a., at sáttmálin fer at seta stór krøv til skúlaverkið og at tað eisini skal nógv til í samband við menniskjaligar førleikar eins og fysiskar karmar fyri at liva upp til ásetingarnar í ST sáttmálanum. Karin Hammer skúlastjóri í Kollfjarða skúla greiddi frá um fyrimunir og vansar við verandi skúlaskipan, og hvønn týdning hon sá at ST sáttmálin kundi fáa, og Hans Jón Thomsen, leiðari av NSR tænastuni greiddi frá um sernámsfrøðiliga økið og tað týdningarmikla í at seta fleiri serkøn fólk í starv. Ætlanin var at ráðstevnan skuldi enda við, at landsstýriskvinnan í Mentamálum skuldi greiða frá ætlanum á undirvísingarøkinum, fyri at liva upp til ásetingarnar í sáttmálanum, men orsakað stjórnarslitið greiddi fulltrúin í MMR, Janus Jensen stutt frá hesum.

Fundir við landsstýriskvinnurnar í undirvísingar - og mentamálum.

Í samband við val í januar 2008 og nýggja samgongu í september høvdu vit í juni mánaði fund við Kristinu Háfoss og í heyst við Helenu Dam á Neystabø. Á fundunum viðgjørdu vit m.a. spurningin um tulking av Dagur og Viku, umframt aðrar føroyskar sendingar. Eisini varð víst á trupulleikan við vantandi teksting av føroysku sendingunum.

Tað hevur leingi verið stór ónøgd við serundirvísingina í fólkaskúlanum, m.a. tí at ov fáir tímar verða tillutaðir til serundirvísing, umframt at serundirvísingin ikki byggir á serfrøðiligt støði. Báðar landsstýriskvinnurnar lovaðu at arbeiða fyri, at grundleggjandi sernámsfrøði gerst partur av læraraútbúgvingini og at arbeiðast skal fyri eftirútbúgving og uppkvalifisering av verandi lærarum.

Fyri stuttum frættist at tímatalið til vanligu serundirvísingina er munandi hækkað og at eftirútbúgving av lærarum skal raðfestast hægri. Arbeitt verður í løtuni við at fyrireika eina nýggja serlæraraútbúgving á Føroya Læraraskúla.Eisini verður samstarvað við Fróðskaparsetrið um eina eftirútbúgvingardepil fyri lærarar o.ø.

Undirvísingartilboð á brekøkinum

Starvsnevndin hevur viðgjørt spurningin um eftirútbúgvingina av starvsfólki á viðkomandi stovnum á brekøkinum og heldur hon, at stórur tørvur er á samanhangandi skeiðsvirksemi og eftirútbúgving, fyri at ein menning kann fara fram.Grundleggjandi heldur starvsnevndin, at tað er ein almenn uppgáva at menna sítt starvsfólk, og metur hon eisini, at nógv tilboð eru í dag, bæði almenn og privat, men at trupulleikin er vantandi samskipan, og at tilrættaleggingin ikki altíð er so miðvís.

MBF heldur tí, at umráðandi er at kanna, hvussu alt hettar økið sær út og tí eru vit farin í holt við at finna út av, hvørji undirvísingartilboð veruliga eru, og hvussu tey vera skipaði. Í tí sambandi verður skipað fyri fundum við viðkomandi fólk, feløg og arbeiðspláss, umframt at MBF blaðið, ið kemur út í mai, fer at lýsa hettar økið. Seinri í ár verður so tikið samanum, hvat víðari skal gerast.

Rættindi

Tá ST sáttmálin um vernd og rættindi teirra brekaðu varð samtyktur í ST í 2006, gjørdu vit í MBF okkum greitt, at skuldu vit hava nakra vón um, at hann eisini skuldi koma at galda fyri Føroyar, mátti MBF gera eitt upplýsandi arbeiði um sáttmálan og virka fyri, at politisk stig vórðu tikin fyri at seta arbeiðið í gongd.

Eftir at vit skrivliga heittu á landsstýrið um at fáa sett ein arbeiðsbólk, sum kundi byrja at viðgera sáttmálan fyri at fáa hann settan í gildi í Føroyum, setti táverandi løgmaður Jóannes Eidesgaard ein arbeiðsbólk undir Løgmansskrivstovuni.

Í oktober 2007 setti Løgmaður eina nevnd at fyrireika, at ST-sáttmálan, um rættindi teirra brekaðu verður settur í gildi í Føroyum. Tá ið nýtt landsstýrið seinri varð sett, varð økið flutt til Uttanríkismálaráðið at umsita. Arbeiðið í bólkinum hevur verið skipað soleiðis, at øll stjórnarráðini hava verið umboðað, nøkur beinleiðis í bólkinum og onnur við kontaktpersónum. Harumframt hevur MBF verið umboðað við tveimum limum, Formanninum og so Heðin D. Poulsen, løgfrøðingi. Barbara á Tjaldrafløtti, frá Uttanríkisráðnum hevur verið formaður og samskipari fyri arbeiðinum. Barbara hevur gjørt eitt sera stórt og gott arbeiði í bólkinum, at fyrireika ST sáttmálan at leggja fyri Tingið, og takkar MBF henni fyri hennara áhaldni og dygdargóða arbeiði.

Sendistovan í Keypmannahavn hevur staðið fyri samskipanini við danska Vælferðarráðið, sum umsitur hetta mál í Danmark, og á henda hátt hevur føroyska nevndin støðugt verið kunnað um gongdina í Danmark.

Sum eitt tað fyrsta varð avgjørt at fáa sáttmálan umsettan til føroyskt. Tað arbeiðið stóð Uttanríkisráðið fyri. MBF fekk so sáttmálan til málsliga hoyring og var Òli Wolles, formaður í Javna, okkara málsligi ráðgevi, og takka vit honum fyri hansara dygdargóða arbeiði. Hansara viðmerkingar eru síðani allar tiknar við í endaligu umsetingina.

Arbeiðið hevur verið drúgt, men munagott. Bólkurin hevur verið nógv saman, og alt tilfarið, sum er komið inn frá aðalráðunum, er gjøgnumgingið. Framløga hevur verið fyri landsstýris- og løgtingslimum fyri at kunna um innihaldið í sáttmálanum, áðrenn hann varð borin niðan í Tingið. 21. apríl var uppskotið til 1. viðgerð í Tinginum og liggur tað nú í Uttanlandsnevndini til víðari viðgerð.

Sum ein part í ætlanini at kunna um týdningin av sáttmálanum settu vit okkum fyri at skipa fyri 3 ráðstevnum, har vit settu fokus á trý økir, - fólkaskúlin fyri øll, - rættindi -og atkoma,- og sosialpolitikk. Tvær tær fyrstu ráðstevnurnar hava verið, tann fyrra var í september og tann seinra í desember. Ráðstevnan í september varð umrødd undir útbúgvingarpolitikki. Triðja og seinasta ráðstevna verður í Norðurlandahúsinum 8. oktober.

Ráðstevnan

Evnið á ráðstevnuni 3 december var um rættindi, atkomu og eftirlit. Vit høvdu fingið spennandi fyrilestrarhaldarar til dagin. Høvuðsrøðari var Fólkatingsins umboðsmaður Hans Gammeltoft Hansen, sum av Fólkatinginum hevur fingið álagt at hava eftirlit við stovnum og øðrum, ið eru fyri fólk við breki. Hansara leiklutur á ráðstevnuni var at siga frá sínum drúgvu royndum á handicapøkinum í Danmark og at siga eitt sindur um týdningin av, at ST sáttmálin verður settur í gildi í DK og í Føroyum.

Løgtingsins umboðsmaður Sólja í Òlavstovu greiddi frá, hvat hennar arbeiði var, og um hennara kanningar av brekøkinum í Føroyum. Nicolina Dahl úr Klaksvík hevði skrivað ein fyrilestur undir heitinum “eg eri ikki við”, og var tað Lauru Joensen, sum las hann upp fyri Nikolinu, sum ikki kundi verða við. Heðin D. Poulsen Løgfrøðingur og Hallbera F West Ráðgevi í Almannaráðnum hugleiddu bæði um, hvussu eftirlitið av sáttmálanum kundi skipast.

Fyri MBF hevur tað verið sera umráðandi, við vanligum orðum at kunna um innihaldið í sáttmálanum, fyri at fáa boðskapin út til flest møgulig, bæði til vanliga fólkið, almennu myndugleikarnar og ikki minst bæði lands- og kommunalpolitikararnar. Hetta haldi eg hevur eydnast rímiliga væl m.a. eisini tí, at føroysku fjølmiðlarnir hava víst stóran áhuga við í tíðindasendingum og øðrum sendingum í Útvarpinum at kunna um sáttmálan og onnur viðurskiftir hjá brekaðum. Somuleiðis hava bløðini við ymsum greinum viðvirkað at tað hevur eydnast so væl at fáa boðskapin út.

Neyvan man nakar sáttmáli hava fingið so drúgva viðgerð og fingið so nógva uppmerksomheit, sum hesin, og er tað eisini høvuðsendamálið, at flest øll fólk skulu kenna ásetingarnar í sáttmálanum og virka fyri, at tær verða fylgdar, og soleiðis gerast tilvitað um tann týdning hesin sáttmálin hevur fyri rættindini hjá fólki, ið bera brek.

Løgfrøðingurin Heðin D. Poulsen hevur verið MBF ein hollur stuðul í øllum arbeiðinum við sáttmálanum, bæði umboðandi MBF í arbeiðsbólkinum, men so sanniliga eisini í dagligdegnum sum ígongdsetari, fakligur vegleiðari og nógv annað.

Atkoma

Byggimál

Fyri at fáa almennan stuðul til byggiverkætlanir, er neyðugt við einari góðkenning frá MBF um at bygningurin lýkur treytirnar fyri atkomu. Hesa eftirlits uppgávu tekur Jógvan Sofus Vágsheyg sær av. Í farna ári hevur hann viðgjørt 10 byggimál. Vit takka Jógvan Sofus fyri hettar arbeiðið.

Byggireglugerð

MBF hevur í áravís heitt á politiska myndugleikan, ið varðar av byggimálum, um at taka stig til at ein byggireglugerð, ið tekur atlit fyri fysiskari atkomu, verður gjørd í Føroyum.

Eftir, at vit á fundi við táverandi landsstýriskvinnuna í Lógarmálum, Helenu D. Á Neystabø, vístu á, at meðan alt meiri og meiri verður bygt í Føroyum, er tað so sera umráðandi, at vit fáa nakrar fastar reglur um, hvussu vit best kunnu gera hetta so, at almennir bygningar kunnu brúkast av øllum. Stutt eftir henda fundin fingu vit boð um, at Innlendismálaráðið nú hevði sett orku av til at orða eina tílíka kunngerð, og fingu vit boð um at møta til fundar, har vit fingu høvi at gera viðmerkingar til eitt byrjunaruppskot.

Innlendismálaráðið hevur sett Òlav Jóanessarsson Hansen á arbeiðið við at orða eina kunngerð, sum skal virka fyri, at allir komandi almennir bygningar verða gjørdir í tráð við nútíðarkrøv um atkomu fyri rørslutarnað v.m. Hetta er so ein byrjan uppá at seta krøv til tað, sum bygt verður í framtíðini. Hetta er kanska bert ein lítil byrjan, tí vit vita, at ætlanin er at gera eina Landsbyggireglugerð sum skal umfata alt innan bygging, bæði tá umræður atkomu, bjálving, o.s.fr.

Innlendismálaráðið upplýsir nú, at kunngerðin er um at verða liðug, og fær MBF hana til ummælis í komandi viku.

Norðurlendskt samstarv

MBF er við í norðurlendskum samstarvi, í NHR (Nordisk Handicappolitiske Råd) og HNR (Handicappedes Nordiske Råd).

Í HNR sita formenninir og aðalskrivararnir fyri meginfeløgini í norðurlondum og teim sjálvstýrandi økjunum. Vit í MBF halda, at vit fáa nógv burturúr norðurlendska samstavinum, av tí at vit har fáa møguleika at síggja brekaðpolitikk út frá einum nógv breiðari og samansettum sjónarhorni enn í vanliga gerandisdegnum.

NHR umboðar eisini tey 5 norðurlondini, umframt tey 3 sjálvstýrandi økini. Tey 5 norðurlondini hava hvør síni 3 umboð, 1 umboðandi handicaporganisatiónirnar, 1 umboðandi politiska myndugleikan og 1 umboðandi embætisstættina. Føroyar hava bert 1 politiskt valt umboð, sum í løtuni er Leila Solmunde. Føroyar hava nú eisini fingið møguleika fyri umboðan sum eygleiðarar í Sektornetverkunum. Janus Jensen frá MMR er valdur sum umboð í sektornetverkið fyri útbúgving og Elsa Lervig Østergaard LMR er vald sum umboð í sektornetverkið fyri byggimál.
Arbeiðið í norðurlendska samstarvinum er framvegis nógv merkt av arbeiðinum við ST -sáttmálan

Vit hava síðani seinasta aðalfund luttikið á 2 fundum, ein í Keypmannahavn og ein Reykjavík.

Fyriskipanarlig viðurskiftir

Limastøðan

Tað eru nú 23 limafeløg í MBF. Limatalið í limafeløgunum er nú umleið 6500 .
Í juni 2008 søkti Stoffskiftisfelagið um limaskap í MBF. Felagið varð stovnað 4. november 2006 og hevur 150 limir. Umsóknin verður tikin upp til støðutakan nú í mai 2009.

Starvsnevndin
Starvsnevndin hevur dagligu umsitingina av MBF um hendi. Starvsnevndin hevur umleið 1 fund um mánaðin, tó undantikið juli og desember mánað. Síðani seinasta aðalfund hava 10 starvsnevndarfundir verið hildnir.

Síðani aðalfundin í 2007 hava hesi mannað í starvsnevndina:
Leila Solmunde, formaður
Hendrik Jacobsen, formaður í Sclerosefelagnum, umboðandi Rørslubólkin, næstformaður
Kristianna Rein, formaður í Diabetesfelagnum, umboðandi Medisinska bólkin
Sigrun Mohr, formaður í Alzheimerfelagnum
Ásmund Reyðberg, formaður í Deyvafelagnum, umboðandi Samskiftisbólkin.

Varaumboð hava verið:
Tórunn Sundberg frá Blindafelagnum, Majgunn Erlandsdóttir Nolsøe frá Psoriasisfelagnum, Óli Wolles, formaður í Javna og Solveig Isfeldt frá Felagnum fyri hoyribrekað.

Skrivstovan

Leila Solmunde hevur verið formaður í Meginfelag teirra brekaðu seinastu 5 árini. Á skrivstovuni arbeiða Anna Suffía Durhuus, ið er dagligur leiðari, og Diana Thomsen, ið er sett hálva tíð sum skrivstovufólk. Kirstin Vilhelmsen arbeiðir sum reingerðarfólk 7 tímar um vikuna.

Arbeiðsuppgávurnar á skrivstovuni eru sera nógvar og víttfevnandi. Frá umsiting av m.a. Serflutningsskipanini og avlamisskeltum og hoyringsarbeiði í samband við lógarsmíð til fundarvirksemi við onnur feløg, stovnar og politiskar myndugleikar og m.a. Árið í ár hevur tó verið merkt av skiftandi manning á politiska økinum orsakað valinum í januar 2008 og so aftur samgonguskiftið í september 2008. Men nógv størsta arbeiðsbyrðan hevur tó ligið í samband við fyrireikingararbeiðið at seta ST sáttmálan á stovn.

Nógv fólk venda sær til MBF við fyrispurningum av ymsum slag. Men so vítt gjørligt átekur MBF sær ikki einstaklingamál, uttan so, at tað hevur serligan almennan áhuga. MBF metir eisini at limafeløgini oftast eru betur før fyri at loysa einstaklingamálini.

Fíggjarviðurskiftir

Illa gongst at fáa hækkað fíggjarliga stuðulin á fíggjarlógini. MBF hevur bæði í 2007 og 2008 sent politiska myndugleikanaum umsókn um at hækka játtanina m.a. fyri at kunna hækka stuðulin til limafeløgini og til raksturin hjá MBF. Í 2008 varð játtanin hækkað við 100.000 kr. og í uppskotinum til fíggjarlógina fyri 2009 var játtanin hækkað við 200.000 kr., upp til 1, 7 mill. kr., men fíggjarnevndin skarvaði hesar 200.000 kr. av aftur, so samlaða játtanin aftur bert gjørdist 1, 5 mill.

Býtislykilin

Smb. viðtøkunum hjá MBF skal aðalfundurin taka støðu til fíggjarliga stuðlinum til limafeløgini eftir at raksturin hjá MBF er frádrigin. Býtislykilin seinastu árini hevur gingið út uppá, at av játtanini uppá 1, 4 mill.verða 2/3 settir av til raksturin hjá MBF og 1/3 fer til at býta millum feløgini. Av sínum parti letur MBF 50.000 kr. og limafeløgini 100.000 kr. til “Tiltaksgrunnin”. Úr Tiltaksgrunninum hava so øll feløgini møguleika at søkja um stuðul til eitthvørt tiltak.

Beinleiðis stuðulin til limafeløgini hevur so, aftaná at 100.000 kr. eru settar í Tiltaksgrunnin, verið 366.666 kr., og eru tær býttar soleiðis millum feløgini: 1/3 verður býttur javnt millum feløgini og restin verður býtt út í mun til limatalið í teimum feløgunum, ið ikki sjálvstøðugt standa á fíggjarlógini.

Játtanin á fíggjarlógini 2008 varð hækkað við 100.000 kr., men av tí at fíggjarlógin ikki varðsamtykt fyrr enn í mai mánaði, tók aðalfundurin í fjør undir við at býta upphæddina í helvt soleiðis at 50.000 kr. fóru til raksturin hjá MBF og 50.000 kr. vórðu settar í "Tiltaksgrunnin".

Føroyski Happadrátturin

Happadrátturin sum er eitt elligamalt spæl, hevur í áravís givið nakað av vinningi, sum er farið í MBF grunnin. 1/3 er ætlaðu til ÍSB og 2/3 eru ætlaðir arbeiðinum innan brekað økið.
MBF hevur frá skiftandi landsstýrum fingið at vita, at ætlanir eru um at niðurleggja happadráttin. Vit hava hvørja ferð víst á okkara ónøgd við hesa ætlan, av tí at hettar stórt sæð er einasti møguleiki fyri at fáa stuðul til ymisk átøk, sum feløgini í MBF virka fyri.

Vit hava nú aftur í ár fingið fráboðan um, at IMR ætlar at niðurleggja Happadráttin, tí at mett verður, at tað ikki er ein almenn uppgáva at skipa fyri eydnuspølum. Í tí sambandi eru vit í MBF spurd um vit ynskja at yvirtaka Happadráttin. Happadrátturin er ein elligomul og ótíðarhóskandi skipan, sum hevur givið undirskot í fleiri ár. MBF heldur hettar vera so mikið svikaligt økð at farið inn á, við tí kapping sum er í dag, og við tí sannroynd, at drátturin hevur givið undirskot í fleiri ár. Tí ynskti MBF ikki at yvirtaka Happadráttin, tí vit mettu, at vágin kundi verða, at vit kanska fingu hall at dragast við, heldur enn vinning, tí annars hevði man væl ikki avtikið happadráttin.

Ístaðin hava vit heitt á IMR, nú Landsstýrið ætlar at lata Tingið avtaka lógina um Happadrátt, um at mæla til at MBF verða fevnt av løgtingslóg nr. 34 frá 23. apríl 1999 um ítróttarvedding soleiðis at MBF setur pengar í hetta felag og afturfyri fær part av avlopinum har. Hetta kundi verið gjørt í samband við at happadráttarlógin varð avtikin. Tað er so, at fyrr høvdu vit møguleika, gjøgnum Ríkisumboðið, at fáa peningaligan stuðul frá "Danske Spil", men henda møguleika mistu vit tá p/f Ítróttarvedding varð sett á stovn. At latið MBF fingið ein part av ágóðanum har, kundi soleiðis kompensera fyri tí sum vit missa við, at happadrátturin verður avtikin, og tí vit mistu av fyrstan tíð, tá samstarv varð skipað millum Danske spil og Ítróttarvedding

Lógararbeiði

Færri lógir hava verið til hoyringar í 2008 enn undanfarin ár. Hettar skyldast sum fyrr nevnt helst tey óstøðugu politisku viðurskiftini. Í farna ári hava vit havt 8 lógir og kunngerðir til ummælis nýggju sinnisjúkralógina, reglugerð um sambýlir, kunngerð um hoyritól, javning av almannaveitingum, kunngerð um stuðul til ávísar viðgerðir til børn, uppskot til broyting í lóg um javnstøðu millum kvinnur og menn, kunngerð um innandura roykirúm og ávaringartekst um heilsuna og royndarverkætlan við viðgerðarskeiðum til børn við serligum tørvi.

At vera við til at gera viðmerkingar til lógarsmíð krevur nógva orku. Vit hava skipað tað soleiðis, at allar lógir og kunngerðir, ið MBF fær til ummælis, verða sendar út til viðkomandi limafeløg, so feløgini kunnu gera sínar viðmerkingar. Í einstøkum førum fáa vit serkøna hjálp frá løgfrøðingi.

Fundir o.a.

Formansfundir. Formansfundirnir er eitt fakligt forum har formenninir í limafeløgunum hittast til sínámillum kunning, ið kann vera við til at styrkja samstarvið millum feløgini, og fyri at fakliga støði mennist. Í farna ári hava 2 formansfundir verið. Til formansfundin 11. nov. greiddi Henning Bøgesvang, prestur, frá um " At leggja oyra til uttan at missa fokus". Hettar var ein sera áhugaverdur fyrilestur.Aftan á varð jólaborðhald.

Til fundin í mars kunnaði Leila Solmunde frá, hvat fór fram í MBF og limafeløgini greiddu síðani frá, hvat arbeitt varð við úti í feløgunum. Eitt evni, ið serligur dentur varð lagdur á, var hvørji skeið og fyrilestrar feløgini skipaðu fyri, og um hvønn tørv tey einstøku feløgini høvdu fyri undirvísing og skeiðvirksemi, hetta sæð bæði í mun til persónin, ið ber brekið, tey fakfólk, ið eru um persónin og avvarðandi.

Starvsnevndarfundir. Í ár hava tilsamans verið 10 starvsnevndarfundir. Fundirnir hava fyri tað mesta verið hildnir seinasta týsdag í mánaðinum. Starvsnevndin hevur ábyrgd av dagliga rakstri felagsins, og verða øll viðkomandi mál tikin upp í starvsnevndini til viðgerðar.

Regluligir fundir við Almannastjóran. MBF hevur regluliga fundir við Almannastjóran, men í farna ári hava bert 2 fundir verið . Á fundunum verða ymisk aktuell mál av almennum áhuga viðgjørd, umframt at ein sínámillum kunning fer fram. Mál, ið hava verið á skánni hava m.a. verið Grázonutrupulleiki millum Almannastovuna og Nærverkið, Eftirútbúgving av starvsfólki og sparingar á Almannastovuni.

Undirvísing. Formaðurin í MBF er javnan á ymsum skúlum m.a. Studentaskúlanum í Kambsdali og Heilsuskúlanum á Tvøroyri. Eisini eru tað nógvir næmingar og lesandi, ið venda sær til MBF í samband við verkætlanir og aðrar uppgávur sum viðger spurningar í samband við brekøkið

Aðrir fundir. Formaðurin og dagligi leiðarin í MBF sita sum umboð í ymsum ráðum, nevndum og arbeiðsbólkum, og leggur tað upp til nógv ymiskt fundarvirksemi. Nevnast kann fundarvirksemið hjá formanninum í Ráðnum fyri brekað, ALV, har nógvir fundir eru og Happadráttargrunninum, og fundarvirksemi hjá dagl. leiðarum í samband Teknmálstulkatænastuna og Serflutningsskipanina

Í summar høvdu vit vitjan av 4 fólkum úr Grønlandi. Vitjanin kom í lag í samband við, at tey vóru í Føroyum fyri at hyggja at Hjálpartólamiðstøðini, nú ein slík skal setast á stovn í Grønlandi. Við á ferðini var eisini formaðurin fyri grønlendska "MBF", Mette Sofie Lerche.

MBF blaðið.

Seinasta árið er 1 blað útkomið og 1 blað kemur út um hálvan mai. Temaið á blaðnum í heyst var um mannarættindi og rættartrygd hjá menningartarnaðum og fólki við demens. Nomið varð eisini við ótíðarhóskandi lóggávuna á hesum øki. Av øðrum evnum kann nevnast ST sáttmálin og frásøgn frá ráðstevnuni í september mánaði.

Tað er Rit&Rák við Torfinn Smith, sum skrivar flestu greinirnar og sum annars tekur sær av øllum viðvíkjandi útgávuni. Blaðið verður sent út til allar viðkomandi almennar og privatar stovnar og myndugleikar umframt til fólk, ið hava ynskt at fáa blaðið. Upplagið er uppá 1500 eintøk. EIK banki hevur nú í 2 ár sponsorerað blaðið við 50.000 kr. árliga

Heimasíðan.

Týdningurin at hava eina aktiva heimasíðu, er stórur í eini tíð har stórt sæð flest fólk søkja sær vitan gjøgnum internetið. Nýggja heimasíðan hjá MBF er ein góður boðberi fyri mál, ið vit kunnu gera viðmerkingar til, og til útlendsk tíðindi sum kunnu verða viðkomandi hjá okkum.
Vit hava vanliga frá 20 til 80 vitjanir um dagin. Summar dagar hava vit 200- 300 vitjanir, og er tað einamest tá skúlar og lærustovnar skulu brúka tilfar til uppgávur og annað, sum snýr seg um brek.

Tá vit skriva lesarabrøv ella senda skriv um okkurt aktuelt mál, sum t.d tingmál sum vit vilja gera onkra viðmerking til, leggja vit hesi skriv út á síðuna eisini.
Limafeløgini kunnu senda okkum boð um teirra fundir, sum vit so leggja út á heimasíðuna undir tiltøk.

Tænastur, Serflutningsskipanin og Handicapskjeltir

MBF umsitur Serflutningsskipan Landsins. Endamálið við skipanini er at veita hjálp til fólk, ið bera brek og eru so tarnað, at tey ikki kunnu nýta almenn flutningstól. Skipanin umfatar Tórshavn, Klaksvík, Vestmanna kommunu umframt allar kommunurnar í Eysturoyar og Sunda kommunu. Tilgongdin til skipanina er alsamt vaksandi. Higartil hevur MBF visiterað til skipanina, men. ætlanin er, at kommurnar sjálvar skulu átaka sær hesa uppgávu. Enn eru tað bert Tórshavnar og Vestmanna kommunur, ið hava átikið sær uppgávuna.

Serflutningsskipanin verður sera nógv brúkt, soleiðis at skipanirnar í Tórshavn og Eysturoynni eru um at gerast ov lítlar, soleiðis at tær hava ringt við at nøkta tørvin.

MBF umsitur eisini handikapskeltini. Umsóknir eftir handicapskjeltum er alsamt vaksandi. Orsøkin til vaksandi tali av umsóknum hongur helst saman við økta talið av bilum og tískil gerast møguleikarnir at parkera tætt við verri. Nógvar av umsóknunum hanga saman við vánaligu parkeringsviðurskiftini á Landssjúkrahúsinum. Arbeitt verður í løtuni við at gera greiðari mannagongdir í samband við tillutan av skeltum.

Húsið

Leingi hevur verið tosað um at fáa eina nýggja úthurð, av tí at tað hevur verið trupult hjá koyristóls brúkarum at koma um gáttina. Nýggj automatisk hurð er nú sett í og harumframt skal túnið gerast, so lættari slepst inn.

Fyri at varðveita húsini í so góðum standi sum gjørligt, er umráðandi er at húsini verða væl hildin. Seinasta ár varð takið málað, í ár er so hurðin skift út og túnið gjørt, og næsta ár er so ætlanin at mála øll húsini uttan.

Ein av fyrstu døgunum verður møguligt hjá limafeløgunum at knýta seg í breiðbandsskipanina í MBF húsinum.

Umboðan í Ráðum og nevndum

Ráðið fyri brekað
Formaðurin í MBF, Leila Solmunde er føddur limur í RfB. Sum varalim fyri hana situr Anna Suffía Durhuus, dagl. leiðari í MBF. Sum umboð fyri MBF situr harumframt Uni Rasmussen og Óli

Wolles sum varaumboð. Barbara á Tjaldrafløtti er formaður í Ráðnum. Í ráðnum sita harumframt Marjun Olsen fyri Føroya Kommunufelag, Steinbjørn Jacobsen fyri Kommunusamskipan Føroya, Rúni Rasmussen fyri Løgmansskrivistovuna og Doris Bjarkhamar og Jan Simonsen fyri AHR.

Happadráttargrunnurin

3 limir manna Happadráttargrunnin og eru tey: Leila Solmunde, formaður í MBF, Barbara á Tjaldrafløtti, formaður í Ráðnum fyri Brekað og Eyðun Mohr Hansen, ið umboðar AHR er formaður í grunninum. Varalimir eru Doris Hansen og Kristianna Rein.

"Ljóðbøkur":

Endamálið við Ljóðbókatænastuni er at skipa fyri ljóðbókaútgávu á føroyskum máli til blind og lesitarnað fólk í øllum aldri.

Margretha Næss hevur sitið sum MBF umboð í Ljóðbókanevndini í nógv ár, og virkar hon dagliga sum samskipari av arbeiðinum við at framleiða ljóðbøkur. Í ljóðbókanevndini sita umframt Margretu Næss, Tórunn Sumberg fyri Blindastovnin, Sólvør Henriksen fyri Landsbókasavnið, Malan Hilmarsdóttir fyri Býarbókasavnið, Solveig Debess fyri Landsmiðstøðina og Ruth Thomsen fyri Blindafelagið.

"Ljóðbøkur" hevur eina heimasíðu www.ljodbokur.fo, har ein sær hvørjar ljóðbøkur eru komnar út.

Ráðið fyri ferðslutrygd

Herit Joensen, Vestmanna situr sum MBF umboð og hevur hon verið umboðað í ráðnum í nógv ár.

FUR,- Føroya Ungdómsráð

MBF hevur 2 umboð í FUR. Umboðini hjá MBF eru Jákup Danielsen úr Nýrafelagnum og Ása Sunadóttir úr Epileptikarafelagnum

Teknmálstulkatænastan

Endamálið hjá Teknmálstulkatænastuni er at taka sær av samskiftinum millum teknmáksbrúkarar og hoyrandi.

Formaðurin í MBF er føddur kassameistari í Teknmálstulkatænastuni, men í løtuni hevur formaðurin latið henda sess til Annu Suffíu Durhuus, dagligur leiðari í MBF.

Serflutningsskipanin

Annu Suffíu Durhuus, dagl. leiðari í MBF situr sum MBF umboð í stýrinum fyri Serflutningsskipanini. Umframt hana situr 1 umboð fyri KSF, 1 fyri FK og 1 umboð fyri AHR.

Sjúklingaráðið

Tey 3 Sjúkrahúsráðini eru nú umskipaði til 1 Sjúklingaráð fyri allar Føroyar. MBF hevur ikki beinleiðis umboðan í Sjúklingaráðnum, men limir úr limafeløgunum í MBF hava møguleika at

gerast limir í ráðnum. Í løtuni sita umboð frá Giktafelagnum, Sinnisbata, Diabetesfelagnum og Javna í ráðnum.

Sambært lógini er uppgávan hjá sjúklingaráðnum at vera ráðgevandi hjá landsstýrismanninum í málum, ið hava týdning fyri veitingar til sjúklingar. Ætlanin er, at ráðið skal geva landsstýrismanninum eitt breiðari avgerðargrundarlag, við at ráðgevingin kann vera øðrvísi enn tann, hann fær frá fakpersónum í heilsuverkinum.